# SØKT VERÐUR EFTIR BUSSFØRARA



Søkt verður eftir bussførara, til at koyra býbuss í Havnini skjótast gjørligt.
Hevur hetta tín áhuga, vinarliga ring til Mouritsen´s Bussar á telefonnummar **28 44 53 / 31 44 64** ella skriva ein teldupost til **mourits@mb.fo**

M B
MOURITSEN'S BUSSAR

# EYKAAÐALFUNDUR

Boðað verður við hesum til eykaaðalfundar í P/F Føroya Banka

**hósdagin 23. november 2006 kl. 16.00**

á Hotel Føroyum, Tórshavn, við hesi dagsskrá:

**1. Val av einum nevndarlimi.**
*Í samband við, at Rúni M. Hansen eftir egnum ynski fer frá sum nevndarlimur skal nýggjur nevndarlimur veljast í hansara stað fyri tað tíðarskeið, sum er eftir av valskeiðnum hjá Rúna M. Hansen.*

**2. Uppskot um viðtøkubroytingar.**
*Vísandi til nýggju peningastovnslóggávuna verður skotið upp at broyta § 3.1 í viðtøkum felagsins soleiðis, at orðingin "sambært banka- og sparikassalógini" verður broytt til "sambært lóg um fíggjarvirksemi (lov om finansiel virksomhed)". Harumframt verður skotið upp at strika fylgjandi orðing í § 10.1: "og tí limi, sum sambært lóg um bankar og sparikassar verður tilnevndur av danska búskaparmálaráðharranum eftir tilmæli frá Føroya Landsstýri."*

**3. Ymiskt.**

---

Fullfíggjaða uppskotið um viðtøkubroytingar liggur frammi á skrivstovu bankans í Húsagøtu 3 í Tórshavn.

Atgongumerki til aðalfundin verða útflýggjað á deildum bankans í seinasta lagi mánadagin hin 20. november 2006.

Tórshavn, tann 8. november 2006.

**NEVNDIN**

FØROYA BANKI

## Berg Motors søkir leiðara til Dekksøluna

Leiðarin hevur ábyrgd av dekksølu deildini og umfatar arbeiði:

- Innkeyp
- Sølu
- Goymslu
- Dekkarbeiði, so sum at skifta, avbalancera, bøta og annað.

Góð løn verur givin til rætta persónin.

Send okkum ein umsókn ella støkk inná gólvið, í seinasta lagi tann 17. november 2006.

Eru spurningar kunnu tit tosað við Karin ella Júst á telefon 313535.

**BERG MOTORS**
*Staravegur 1-3*
*FO-100 Tórshavn*

---

*Berg Motors selur bilar av merkinum Suzuki, Subaru, Kia, Mazda, Land Rover og Scania lastbilar. Vit hava eykalutagoymslu til øll bilmerkini og mekaniskt-, plátu-, sproytu- og dekkverkstað.*

BERG MOTORS
www.bergmotors.fo

## Fráboðan

Við hesum verður sagt frá, at

*sjálveigandi stovnurin Tórshavnar Sjómansheim*

sambært samtykt hjá stýrinum fyri stovnin tann 7. november 2006 og við góðkenning frá høvuðsstýrinum fyri Kirkjuligu Heimamissiónina í Føroyum er farið í sjálvboðna avtøku við Eyðfinnur Jacobsen, advokati, sum avtøkustjóra.

Tey, sum hava peningakrøv móti sjálvsognarstovninum, verða biðin um innan 3 mánaðir aftaná, at henda fráboðan er kunngjørd í bløðunum, at fráboða síni krøv til avtøkustjóran á niðanfyri tilskilaða bústaði:

FAROE
LAW

Tróndargøta 19
Postboks 158
FO-110 Tórshavn

## Skrivstovu-avloysari

Vegna farloyvi er eitt pláss sum skrivstovuavloysari leyst at søkja á politistøðini á Tvøroyri.

Starvstíðin er 30 tímar um vikuna í tíðarskeiðnum frá umleið 15. desember 2006 til umleið 24. juni 2007.

Umsøkjarar skulu hava royndir í skrivstovuyrkinum.

Løn verður veitt eftir sáttmála millum danska fíggjarmálaráðið og HK-felagið.

Umsókn við prógvum og møguligum viðmælum verður at senda landfútanum, Smyrilsvegur 20, Postboks 3018, 110 Tórshavn.

Upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sommer Joensen, sýslumann, Tvøroyri, á tlf. 371448.

Umsóknarfreistin er sett til 24. november 2006.

**Føroya Landfúti,** tann 9. november 2006

Karen Marie Olesen